**Fylgiskjal 2**

týs. 26.02.2019 15:58

Undirritaði skal vegna Frískúlan í Havn gera hesar viðmerkingar til lógarbroytingina.

Mælt verður til at § 3 a, stk. 2. nr. 1) verður orðað soleiðis at lógarásetingin eisini fevnir um íløgur hjá frískúlum.

Eitt uppskot kann vera at orðið "frítíðarvirksemi" verður broytt til "virksemi". Alternativt kann nágreinast í viðmerkingunum, at frískúlar eisini kunnu fáa MVG-endurgjald í sambandi við íløgur í bygningar.

Frískúlar fáa stuðul til rakstur frá land og kommunu. Tó verður eingin stuðul latin til bygging, keyp ella leigu av bygningum. Soleiðis sum lógin er orðað er tað einans skúlar sum verða riknir av samkomum, sum kunnu fáa MVG-afturbering. Hetta halda vit ikki er rættvíst.

Vinarlig Heilsan

Heri Joensen
Heiðavegur 6
Tórshavn